# Heðin Arge mynstrar av

**»Og á skránni nú eru 15 tær bestu, Heðin Arge stílar fyri«. Hasi orðini munnu flest øll hava hoyrt okkurt leygarkvøldið. Heðin Arge, sum seinastu átta árini, hevur staðið á odda fyri hitt-listasendingini 15 tær bestu hevur valt at mynstra av. Nýggjur vertur er Niels Uni Dam**

ÚTVARP
*Ingrid Bjarnastein*


*Heðin Arge leggur frá sær í tónleika-hittlistanum, 15 tær bestu, eftir átta ár*

Er hann nevndur, er hann kendur. Beatbox 328, Náttaravnarnir og 15 tær bestu eru helst tær sendingarnar hann man vera kendast fyri, og so hetta seinasta árið eisini Leið 5, sum hann hevur havt saman við Bjarna Mohr og Rúna Jákupssyni. Tvær tær fyrstu sendingarnar eru farnar í søguna, og nú hevur hittlistaveteranurin valt at fara niður við flagginum. Heðin Arge er ikki longur vertur í 15 teimum bestu.

– Orsøkin er heilt einfalt hon, at eg tími ikki meira, sigur tann so vælkenda útvarpsrøddin.

– Fyri so vítt havi eg ongantíð rættiliga verið vekk frá hasi sendingini, og eg havi leingi verið troyttur av henni. Tað er komið fyri, at eg havi verið burtur nakrar sendingar, nakrar ferðir, men tá hatta ikki er meira enn freelance, so er tað eitt sindur ov krevjandi.

### 2 dagar fyrireiking

Heðin sigur, at tað hevur verið hugurin til at gera sendingarnar, ið hevur drivið verkið, men nú hann er farin, er ikki nógv eftir.

– Tveir til tríggir heilir dagar um vikuna fara til at fyrireika ein tíma av tónleiki. Og um ein vil vera seriøsur, og geva lurtarunum eina góða vøru, so krevst, at tú fylgir væl við eisini. Tað vísir seg eisini, at tónleikararbransjan sjálv hevur verið óguvliga áhuga í sendingini, og tí er tað týdningarmikið, at vøran verður so góð sum møguligt, greiðir náttaravnurin frá.

Eisini sigur Heðin, at tey ungu, ið ganga í fólkaskúla fylgja ótrúliga væl við, hvat gongur fyri seg, bæði á tí altjóða og føroyska tónleikamarknaðinum. Tí er kravt av einum slíkum útvarpsverti, at hann ajourførir seg, hvønn dag, og veit, hvat gongur fyri seg á teimum útlendsku hittlistinum.

– Um eg ikki fylgi við, so verða viðmerkingar beinanvegin gjørdar til tað inni á heimasíðuni. Fólk fylgja við, og um eg ikki brúki tónleikin, so eri eg »yt« og verði skeldaður fyri tað. Tá ein er inni á heimasíðuni hjá útvarpinum fyri at atkvøða, so er eisini møguleiki at koma við viðmerkingum, og eru tað nógv, sum brúka hendan møguleikan. Tíbetur er tað mesta rós, men tað er eisini komið fyri, at eg eri vorðin skeldaður.

Sendingin hevur seinastu átta árini koyrt meira ella minni eftir sama leisti. Tó er eitt sindur broytt, tá hugsað verður um atkvøður. Tá 15 tær bestu byrjaðu, vóru seðlar sendir út til framhaldsskúlarnar í landinum, har næmingarnir so sluppu at atkvøða, og síðani sendu seðlarnar aftur til Útvarpið. Tá internetið so veruliga tók dik á seg, var listin lagdur út á heimasíðuni hjá útvarpinum, har hann hevur ligið líka síðani, har ein og hvør, ið hevur atgongd til internetið kann fara inn at atkvøða, líkamikið um viðkomandi situr í Havn ella í Hong Kong.

– Hetta er tann einasta veruliga broytingin, ið er farin fram í sendingini, sigur Heðin.

– Eg havi sjálvur ikki sæð nakra menning við henni, uttan tað, at undirtøkan er nógv vaksin. Spakuligt, men støðugt.


*Nýggi verturin í sendingini er Niels Uni Dam, forsangari í bólkinum, MC Hár*

### Heldur fram

Sjálvt um Heðin hevur lagt Náttaravnarnar, Leið 5, Beatbox 328 og nú 15 tær bestu, halda bæði hann sjálvur og sendingin fram, so tey ungu verða ikki snýtt fyri hittlistan í Útvarpi Føroya. Nýggi verturin eitur Niels Uni Dam, og er hann eisini eitt kent navn her á klettunum. Hann er tann einaferð so provokerandi frontfigururin í bólkinum MC Hár, sum tó ikki hevur verið so nógv frammi seinastu árini. Við tónleikaportalin, pop.fo sigur Niels Uni:

– Eg eri fylgi væl við í føroyskum tónleiki, og tí fari eg helst, at geva føroyskum sangum møguleika sum eykaløg.

Í fyrstu syftu fer hann at framleiða sendingina eftir somu uppskrift sum Heðin, men Niels Uni hevur eisini hugskot til broytingar, sum møguliga koma einaferð í framtíðini.

15 tær bestu er annars einasti regluligi tónleikahittlistin fyri ung í Føroyum. Heðin sigur, at eina vanliga viku, eru eini 500 fólk inni og atkvøða. Men um okkurt serligt føroyskt lag er á skránni, kann talið skjótt fara uppum tey 1000. Hetta var tó ikki vanligt – heldur var hetta undantakið.

– Størsta stríðið er at fylgja so væl við. Tú mást vera konsentreraður næstan døgnið runt og fylgja við, hvat gongur fyri seg allastaðni í tónleikaheiminum. Tað tími eg ikki longur. Eg havi annað at gera enn bara at sita og lurta eftir tónleiki, sigur Heðin.

Men sjálvt um allar hesar so vælumtóktu sendingar eru lagdar á hyllina fyri Heðinsa viðvíkjandi, so hevur hann tó ikki lagt útvarpsarbeiðið heilt á hyllina. Hann sigur, at hann fer at hava onkra sending í vetur, men hvat tað verður, veit hann ikki rættiliga enn. Men eftir øllum at døma er endin komin á leygarkvøldssendingum við Heðini í Sortudíki.

# Eldur í Eirargarði

**Eldur kom í nøkur reingerðaramboð í einum av bygningunum hjá Landssjúkrahúsinum í Eirargarði. Eldurin varð skjótt sløktur**

ELDSBRUNI
*Heri á Rógvi*


*Her kyknaði eldurin í gjárkvøldið. Ongin mansskaði stóðst av eldinum, men rúmið har eldurin kyknaði fór illa, og rúmini rundanum fingu roykskaða*

*Mynd: Heri á Rógvi*

í gjárkvøldið – týskvøldið – vóru boð eftir løgregluni og sløkkiliðnum á Eirargarði í Havn, har Landssjúkrahúsið fyri tað nógva heldur til.

Í tí eina av bygningunum, har Ergoterapiin heldur til, var eldur kyknaður, og nógvur roykur var at síggja. Talan var kortini ikki um nakran stóran eld. Sløkkiliðið nýtti ein eldsløkkjara á staðnum til at sløkkja eldin. Fráboðan kom kl. 20.55, og eldurin varð sløktur stutt eftir, at sløkkiliðið var komið á staðið.

Mett verður, at orsøkin til eldin er, at onkur hevur verið óansin við einari sigarett. Rúmið, har eldurrin kyknaði, verður nýtt sum roykirúm, og har standa eisini ymisk amboð til reingerðararbeiði. Eldurin er kyknaður millum nøkur reingerðaramboð, men hann megnaði ikki at breiða seg nakað stórvegis.

Sjálvt roykirúmið fór illa av eldinum, og onnur rúm á somu hædd fingu roykskaða, men eingin mannaskaði stóðst av eldinum.

Tað snýr seg altso um at ansa sær, tá sleppast skal av við sigarettina.



UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Stórreiðarí

Danska reiðaríið Torm hevur sett sær fyri at skipa eitt danskt stórreiðarí og hevur í tí sambandi boðið upp á partabrøv í reiðarínum Norden. Sum skilst kom boðið óvart á leiðsluna í Norden, og partaeigararnir í felagnum hava fingið freist til ólavsøkudag at svara tilboðnum frá Torm.

Verða tey bæði reiðaríini løgd saman, kemur nýggja stórreiðaríið at hava ein umsetning upp á einar fimm milliardir krónur, og tað bókaða virðið á skipunum verður oman fyri tríggjar milliardir krónur. Torm og Norden reka í dag165 skip, og reiðaríini hava 19 skip í gerð.

## APM til Algeria

A. P. Møller økir nú sítt virksemi í oljuvinnuni í Algeria. Higartil hevur felagið bert havt smávegis samstarv við algeriska oljufelagið Amadarco Petroleum, men nú hevur danska felagið fingið 33 prosent av einum nýggjum loyvi, sum algerisku myndugleikarnir hava boðið út.

Anders Wúrtzen, varastjóri í Mærsk Olie og Gas segði fyrr í ár, at felagið hevði stóran áhuga í framtíðar oljuvinnuni í Algeria, og hann helt útlitini har vera sera góð. Frammanundan er Mærsk virkið í Qatar.

Saman við algeriska felagnum skal Mærsk Olie og Gas bora umleið 60 brunnar í algerisku oyðimørkini longu í hesum árinum. Samstundis skulu nógvar seismiskar kanningar gerast.

Amadarco er í dag ført fyri at framleiða 285.000 tunnur av olju um dagin, men avgjørt er at økja orkuna til 500.000 tunnur um dagin í 2004.

# Tað mundi hent í Noregi


*Týskir løgreglumenn kanna vrakið av russiska flogfarinum, sum stoytti saman við eitt flutningsflogfar yvir Suðurtýsklandi mánakvøldið. Fyri trimum árum síðani var eitt annað russiskt flogfar nær við at stoyta saman við eitt flogfar hjá SAS yvir Suðurnoregi*

*Mynd: Reuters*

**Fyri trimum árum síðani vóru eitt flogfar hjá SAS og eitt russiskt flogfar nær samanstoyti í norskum loftrúmi**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen*

Tilburðurin tá eitt russiskt ferðamannaflogfar og eitt flutningsflogfar stoyttu saman í luftini yvir Suðurtýsklandi mánakvøldið var annar í røðini av tílíkum vanlukkum. Tann fyrra var yvir kroatiska býnum Zagreb, tá eitt bretskt og eitt jugoslaviskt flogfar stoyttu saman.

Men fyri góðum trimum árum síðani mundi tað sama hent í Noregi.

Tann 12. apríl í 1999 var eitt SAS-flogfar á veg frá Flesland-flogvøllinum í Bergen til Gerdermoen í Oslo. Frá flogeftirlitinum í Stavanger fekk flogfarið boð um at flúgva í 25.000 fóta hædd.

Um somu tíð var eitt flogfar hjá russiska flogfelagnum Arkhangelsk Airlines á veg til Flesland-flogvøllin í Bergen. Flogeftirlitið gav russiska flogfarinum boð um at halda seg í 26.000 fóta hædd.

Hálvan triðja minutt seinni varnaðist flogleiðarin í Stavanger, at russiska flogfarið var farið niður um ta hæddina, sum tað hevði fingið boð um at halda seg í, og at tað var farið niður í í 25.000 fóta hædd, har SAS-flogfarið eisini var. Flogleiðarin gav alt fyri eitt russiska flogskiparanum boð um at fara uppaftur í 26.000 fóta hædd fyri at sleppa undan samanstoyti. Samstundis gav flogleiðarin SAS-flogfarinum boð um at snara 20 stig til vinstru.

Umborð á SAS-flogfarinum vóru ávaringarljósini farin at blunka, tí tann sjálvvirkandi ACAS-skipanin segði frá, at eitt annað flogfar var í nánd. Ávaringartólið bað SAS-flogskiparan fara longur upp, og tað gjørdi hann. Men tað bar í sær, at teinurin millum tey bæði flogførini minkaði. Til alla lukku varnaðist ACAS-skipanin í SAS-flogfarinum, at tað russiska flogfarið eisini var í ferð við at taka seg uppeftir. SAS-flogskiparin fekk tí boð um at fara longur niður, og á tann hátt slapst undan samsanstoyti.

Russiska flogfarið, sum var av Tupolev 134-slagnum, hevði ikki ACAS-ávaringarskipanina. Kravið um tílíka útgerð kom ikki fyrr enn árið eftir.

# 70 milliónir kunnu doyggja av eyðkvæmi

**Tey næstu 20 árini fara meiri enn 70 milliónir fólk at doyggja av eyðkvæmi, gera tey ríku londini ikki meiri við bardagan ímóti sjúkuni, sigur ST**

EYÐKVÆMI
*Árni Joensen*

Um allan heimin eru meiri enn 40 milliónir fólk HIV-smittað ella hava fingið eyðkvæmi, og talið veksur støðugt.

- Hetta er ein umfarssótt, sum er verri enn tær, vit hava sæð fyrr, segði Peter Piot, sum samskipar eyðkvæmistiltøkini hjá ST, tá 14. altjóða ráðstevnan um eyðkvæmi varð sett í Barcelona týsdagin.

Í einari frágreiðing, sum ST legði fram á ráðstevnuni, stendur, at vandi er fyri, at eitt heilt ættarlið í Afrika fer til grundar orsakað av eyðkvæmi.

- Eyðkvæmi er ikki longur bara ein sjúka, men hetta snýr seg nú eisini um búskaparliga og sosiala menning og umframt trygd, segði Peter Piot. Hann legði afturat, at í Afrika kann umfarssóttin fáa álvarssamar avleiðingar fyri sjálva trygdina í øllum heimspartinum, tí hon forðar búskaparligari menning og elvir til hungursneyð.

Frágreiðingin hjá ST er óhugnaligur lesnaður. Í fjør kravdi eyðkvæmi tríggjar milliónir mannalív, harav 2,2 milliónir í Afrika. Fimm milliónir vórðu smittað í fjør. Síðani sjúkan varð staðfest fyrstu ferð í 1981, eru 20 milliónir fólk deyð av henni, og 14 milliónir børn eru vorðin foreldraleys.

Bara í londunum sunnan fyri Sahara-oyðimørkina eru 28,5 milliónir fólk HIV-smittað ella hava fingið eyðkvæmi. 70 prosent av teimum, sum fáa smittuna, fáa eisini eyðkvæmi, stendur í frágreiðingini.

ST heitir á tey ríku londini um at økja stuðulin til bardagan ímóti umfarssóttini. Uttan størri stuðul verður ógjørligt at forða einari enn størri vanlukku.

Úr Norðurlondum:

## Fleiri vóru njósnarar

Ein nýggj bók vil vera við, at umleið 50 norðmenn njósnaðust fyri gomlu eysturtýsku fregnartænastuna Stasi.

Hansjúrgen Wolf, sum hevur skrivað bókina, arbeiddi sjálvur hjá Stasi, til hann í 1981 rýmdi til Noregs. Í sambandi við bókina hevur hann leitað í skjalagoymsluni hjá Stasi, og harsigur hann seghava funnið nøvnini á fleiri norðmonnum, sum arbeiddu fyri eysturtýsku fregnartænastuna.

Hansjúrgen Wolf sigur, at hann ætlar sær ikki at avdúka nakran av teimum norsku Stasi-njósnarunum. Í bókini nevnir hann hinvegin fleiri eysturtýskarar við navni, men felags fyri teir allar er, at teir eru ikki á lívi longur.

## Nýggjur flokkur

Danir fáa ein nýggjan flokk á vallistan, tá fólkatingsval verður aftur. Innanríkisráðið í Keypmannahavn góðkendi týsdagin Minnilutaflokkin, eftir at stigtakararnir høvdu handað myndugleikunum 21.016 undirskriftir. Fyri at fáa ein flokk góðkendan í Danmark krevjast 19.172 undirskriftir.

Høvuðsmálini hjá Minnilutaflokkinum eru javnrættindi fyri øll og bústaðarrættur, og so er flokkurin eisini ímóti ES.

## Nógvur laksur

Stuttleikafiskimenn hava havt góðar dagar við Målselva í Noregi í seinastuni, tí har hevur verið sjáldsama nógvur laksur at fáa. Teir, sum fiskirættindini í ánni, siga, at teir selja umleið 20 fiskikort um samdøgrið, og at áhugin er stórur.

Í Målselva eru laksatrappur. Um hesa tíðina í fjør vóru bara tíggju laksar slopnir niðan um trappurnar, men í ár eru meiri enn 200 farnir niðanum. Og tað kemur stuttleikafiskimonnunum væl við.